gult cyan magenta svart



Kyndil–VÍF 27–28 (12–14)

# Kyndil tapti silvurið

**VÍF dró longra stráið móti arvafíggindanum Kyndli í dysti, sum hevði ein sera spennandi enda. Við ósigrinum misti Kyndil møguleikan at vinna silvurmerkini, sum teir fóru eftir, men havnamenn kunnu ugga seg við, at teir fáa bronsumerkini undir øllum umstøðum**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Tað var ikki nógv ferð á dystinum sunnudagin millum Kyndil og VÍF*

Hóast meistaraheitið fyri langari tíð síðani er farið til Vestmanna, so varð lagt upp til ein spennandi dyst millum Kyndil og VÍF. Hetta er klassikarin í føroyskum hondbólti, og fólk fingu eisini spenning at síggja.

Kyndlamenn vóru uppsettir at vinna dystin og løgdu nógv fyri í teirra stremban eftir at gerast næstbestir í føroysku landskappingini, men tað eydnaðist ikki á hesum sinni.

Ein av fortreytunum fyri at vinna á VÍF er, at Ingi Olsen verður hildin í føstum teymum. Hesa uppgávuna fekk Høgni Klein, sum mansvardi Inga Olsen næstan allan dystin. Ingi svaraði aftur við at reika runt, og hann fór onkuntíð inn á strikuna fyri at sleppa undan tí tøttu eftiransingini.

Ingi Olsen er ein sera vandamikil leikari, og hann vísti sítt virði, tí hvørja ferð hann slapp leysur, so var vandi á ferð. Hann gjørdi eisini tað seinasta og avgerandi málið, tá hann við langskoti legði bóltin framvið Peturi Magnusson í Kyndlamálinum.

### Fylgdust

Liðini bæði fylgdust í málskjótingini í fyrra hálvleiki. At byrja við var Kyndil við yvirlutan, men sum hálvleikurin leið, dró VÍF hinvegin frá vertunum. Tá komið var til hálvleiks, vóru tvey mál á muni, og tað tóktist sum gestirnir vóru eina tonn betri og neyvari í sínum álopsspæli. Tó vóru ongantíð fleiri enn trý mál á muni fyri steðgin.

Við átta málum í part vóru tað brøðurnir báðir Áki og Ingi, sum gjørdu enda á Kyndli. Saman við Sámali Joensen høvdu teir stillað kanónirnar rætt, og tá teir sluppu til skot, so endaði bólturin oftast í netinum.

Kyndil skifti nógv út, tá skift varð frá verju til álop, og Bjarni Wardum spældi fyri tað mesta í álopinum. Bjarni var vandamiklasta hóttanin útifrá, sum Kyndil hevði, og hann varð eisini mansvardur til tíðir av Johnny Joensen.

### VÍF dregur frá

Tá VÍF liðið vísti seg aftur á vøllinum vóru teir naskari og meira ágangandi enn áður. Kyndlamenn vóru heldur meira afturhaldandi og ikki so svangir hóast tað vóru teir, ið skuldu vinna dystin.

Tað einu løtuna steðgaði Kyndil upp, og VÍF tók yvir. Serliga var tað Áki Olsen, sum vísti sínar dygdir hesa løtuna. Hann skeyt fýra mál í fimm minuttir, og tá hildu tey flestu, at VÍF fór at koyra sigurin heim uttan trupulleikar. VÍF legði nú sjógv ímillum seg og Kyndil, og ta einu løtuna vóru fimm mál á muni.

Men Kyndil legði ikki árarnar inn. Heimaliðið helt fram við at stríðast, og serliga Bjarni Wardum gjørdi fleiri mál, tá Kyndil royndi at fanga føroyameistararnar aftur.

Móti endanum eydnaðist tað Kyndli endiliga at javna, men hóast Kyndil hevði mentala yvirtakið, so dró VÍF longra stráið. Tað vóru teir báðir stórskjúttarnir Sámal Joensen og Ingi Olsen, sum skutu tey seinastu málini, sum tryggjaði VÍF enn ein sigur.

Kyndil hevði ein møguleika at javna í seinasta álopinum, men skotið fór á høvdið á málverjanum Eli Müller, sum stóð ein góðan dyst.

Dysturin endaði við eini margháttligari støðu. Eli skal tveita bóltin út í spælið og bara tíggju sekund eru eftir. Hann tveitir til Inga Olsen, sum trýstir bóltin aftur til Eli. Kyndamenn vilja hava brotsspark, men dómarin letur ikki við seg koma, og VÍF vinnur.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Bjarni Wardum 8, Høgni Klein 5, Uni Wardum 4, Hanus Jensen 3, Jónleif Sólsker 2, Janus Einar Sørensen 2, Heini Bendtsen, Regin Petersen 1
VÍF: Ingi Olsen 8, Áki Olsen 8, Sámal Joensen 5, Johnny Joensen 4, John Zachariasen 2, Petur Frank Joensen 1
Brotskøst: Kyndil 2, VÍF 2
Útvísingar: Kyndil 4, VÍF 3
Dómarar: Hjalmar Petersen og Kristian Johannesen

StÍF–Neistin 35–28 (18–13)

# Strandingar tryggjað sær silvur

**Við einum tryggum sigri á Neistanum hevur StÍF tryggjað sær silvurmerkini í ár. Heimaliðið megnaði at halda fast um leiðsluna, og StÍF hevði tamarhald á støðuni allatíðina**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Við Kyndli í hølunum skuldi StÍF vinna fyri at kenna seg tryggan í at fáa silvurmerkini. Nú Kyndil snávaði móti VÍF, kundi StÍF ogna sær silvurmerkini við einum sigri.

StÍF legði beinanvegin sjógv ímillum seg og Neistan. Tá tíggju minuttir vóru farnir var heimaliðið fýra mál frammanfyri, og munurin minkaði ongantíð eftir hetta. Heldur útbygdi StÍF leiðsluna við enn fleiri málum.

Serliga vandamikil var Artur Johansen, sum gjørdi ikki færri enn níggju mál. Hann er eisini toppskjútti hjá StÍF samanlagt í ár, og hann hevur verið virðismikil í fleiri dystum, so var eisini sunnudagin í høllini á Skála.

Neistin misti við hesum ósigrinum møguleikan at vinna bronsuna, sum teir mugu síggja Kyndil fara avstað við.

Seinasti dysturin hjá StÍF verður ímóti VÍF, og tá skulu strandingar vísa, at teir ætla sær at bjóða avaftur næsta kappingarár. Neistin skal tá taka ímóti Kyndli í týdningarleysari grannauppgerð.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
StÍF: Artur Johansen 9, Costin Dumitrescu 7, Alexandur Johansen 6, Marius Joensen 6, Janus Trúgvason 2, Jón Rasmussen 1
Neistin: Rani Slættanes 6, Áki Mørk 5, Jacob Jónsson 4, Jákup Sverri Kass 4, Rune Møller 3, Ári Rouch 3, Ragnar Zachariasen 2, Kári Mortensen 1
Brotskøst: StÍF 4, Neistin 2
Útvísingar: StÍF 3, Neistin 4
Dómarar: Geir Wardum og Carsten Andersen



Kyndil–VÍF 10–31 (4–14)

# Lættur sigur til VÍF

**VÍF hevði ikki torført við at vinna á Kyndli í høllini á Hálsi sunnudagin. Heili 21 mál vóru á muni, og Kyndil fekk tvey reyð kort**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Kyndil hevði ikki nógv at bjóða uppá, tá føroyameistararnir úr Vestmanna vóru á vitjan. VÍF næstan tók sær av løttum, og munurin á liðunum var stórur. VÍF er fremst og føroyameistari, meðan Kyndil er triðniðast.

Fyrstu tjúgu minuttirnar skoraði Kyndil bara eitt mál, meðan VÍF syrgdi fyri einum jøvnum streymi inn í Kyndlamálið.

Kyndil fekk trupulleikar í seinna hálvleiki, tá tveir leikarar fingu tað reyða kortið. Ta einu løtuna vóru bara tríggir útispælarar hjá Kyndlil, og málverjin mátti skifta troyggju og spæla úti.

VÍF vísti enn einaferð, at tær hava verið ein flokk omanfyri hinum liðunum, og um tær varðveita sítt fólk, vera tær tungar at syfta næsta kappingarár.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Lotte Sørensen 3, Palma Petersen 2, Ann Hansen 2, Jensia Petersen 2, Kristbjørg Petersen 1
VÍF: Jacklin Durhuus 9, Ioana Rapa 9, Sóley Mikkelsen 4, Fríða Marjunardóttir 4, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 3 Randi Kúrberg 2
Brotskøst: Kyndil 2, VÍF 9
Útvísingar: Kyndil 4, VÍF 1
Reyð kort: Kyndil 2
Dómarar: Hjalmar Petersen og Kristian Johannesen



*VÍF vísti enn einaferð, at teir eru klárt tað besta liðið í Føroyum*

VB–Neistin 18–18 (11–10)

# Neistin bardi seg aftur

**Tað eydnaðist Neistanum at fáa javnleik móti VB í Vági, hóast heimaliðið var frammanfyri tað mesta av dystinum**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

VB er enn á triðja plássi, men tær mugu bíða nakrar dagar, áðrenn tær kunnu vera heilt vísar í, at bronsumerkini fara suður til Vágs í ár. Neistin er fýra stig aftanfyri og hevur tveir dystir eftir enn. VB hevur tó nógv betri málmun, og tískil kunnu tær vænta sær at fáa bronsuna um hálsin, tá kappingarárið endar um eina viku.

VB legði seg framum beinanvegin í dystinum, og tær høvdu eina eitt máls leiðslu, tá farið varð til hálvleiks. Tískil var alt opið til seinna hálvleik.

VB helt fram har tær sleptu og hildu allatíðina frástøðu niður til Neistan við einum ella tveimum málum. Tað lá tí í kortunum, at VB fór at sigra, men so skuldi ikki vera.

Neistin hevði ikki ætlanir um at fara norðuraftur við ongum, og tí kempaðu tær til endan. Útiliðið bardi seg innaftur í dystin og tryggjaði sær eitt stig móti endanum av dystinum, tá tað eydnaðist at javna.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VB: Regina Radó 7, Gurið Mortensen 4, Andrea Lütz 3, Christina Holm 2, Eyðbritt Krosslá 1, Mary Krosslá 1
Neistin: Súna Mørk 4, Annika Thomsen 4, Bjørg Patursson 3, Katrin á Neystabø 3, Birita Wardum 2, Susan Brockie 1, Kerstin Rasmussen 1
Brotskøst: VB 6, Neistin 4
Útvísingar: Neistin 2
Dómarar: Justines Justinussen og Poli Hansen

Stjørnan–Tjaldur 35–20 (17–9)

# Stjørnan vann trygt

**Botnliðið úr Runavík hevði ongan kjans ímóti Stjørnuni, sum vann við 13 málum**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin spæld Stjørnan næsta dystin innan tveir dagar, og aftur hesaferð vunnu klaksvíkskvinnur tryggan sigur.

Hesaferð var mótstøðuliðið Tjaldri, sum hevur ligið í skeiva endanum av stigatalvuni alt árið. Tjaldur gjørdi tó bart herfyri, tá tær vunnu greiðan sigur á einum Kyndlaliði, sum hevur staðið seg illa í ár.

Lítil ivi var tí um, hvat hesir dysturin skuldi enda við, tí eftir at Tjaldri hevði havt sína løtu fyrsta partin í dystinum, kom heimaliðið fyri seg, og í seinna hálvleiki rann Stjørnan frá gestunum, sum als ikki kláraðu at fylgja við í málskjótingini.

Tjaldur var á odda fyrsta korterið av dystinum, og einu løtuna var tvey mál á muni millum liðini, men tá Stjørnan fyrst hevði tikið Tjaldri, komu gestirnir ongantíð fram um aftur.

Úrslitið av dystinum var 35-20 til Stjørnuna, sum hevur avgreitt silvurmerkini fyri í ár. Liðið var meistari í farna kappingarári, men í ár hevur VÍF verið drúgvir í oddanum. Seinasti dysturin hjá Stjørnuni er ímóti VÍF, og tá hava klaksvíkskvinnur eisini seinasta møguleikan í ár til at vinna á VÍF. Higartil hevur tað ikki eydnast.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar**
Stjørnan: Andrijana Milodanovic 8, Anna Kristina Samson 7, Annika Ljósstein 5, Joan Midjord Joensen 4, Una Olsen 2, Bára Skaale 2, Simona Dziugyte 2, Sólvá Eystberg 2, Berlina Sólsker, Rannvá Andreasen.
Tjaldur: Beinta Joensen 7, Melitza Ergic 6, Jelena Javtic 3 Mona Langgard 2, Kristine Ellingsgaard 2.
Brotskøst: Stjørnan 3, Tjaldur 2
Útvísingar: Stjørnan 4, Tjaldur 4
Dómarar: Hans Thomassen og Hanus Kúrberg.